29. januar 2008 kl. 17.30 hevði Klaksvíkar Býráð býráðsfund við niðanfyri standandi fundarskrá.

Allir limir á fundi uttan Hans Arne Bertholdsen.
Erik Andreasen møtir fyri Jákup Mikkelsen.

Samtykt at loyva, at Signhild Joensen møtir fyri Torleif Sigurðsson, sum er burturstaddur.

1.
2008-01-001 Húsvognaøki í miðbýnum – Tekniska umsiting,

Norðoya Kunningarstova og Norðoya Bjargingarfelag hava heitt á T.U. um ávísing av øki til húsvognapláss til tiltøkini, sum verða í summar.
T.U. hevur spurt seg fyri, um møguleiki er at nýta útfyllingina í miðstaðarøkinum til húsvognaøki í summar. Hetta letur seg gera.
Havandi í huga, at alt fleiri kampistar koma til Føroya á hvørjum ári, og tey mongu tiltøkini sum skulu verða í býnum komandi summar, so sum Summarfestivalurin, Sjómannadagurin og Norðoyastevnan, og at býurin fyllir 100 ár, mælir T.U. til, at útfyllingin við Sandin, sum ein roynd, verður gjørd til húsvognaøki summarmánaðirnar 2008.
Eisini mælir T.U. Fíggjarnevndini til at fíggja tilriggingina upp til 500.000,- kr., av kontu 141800 Miðbýurin, og at inntøkurnar verða góðskrivaðar somu kontu.

Tekniska nevnd tekur undir við tilmæli frá T.U. dagf. 09.01.08.

Ein minniluti í Fíggjarnevndini, Steinbjørn O. Jacobsen og Kristian Fríðrik Olsen taka undir við tilmæli frá T.U. dagf. 15.01.08.
Ein annar minniluti Kristian Eli Zachariassen og Erik Andreasen taka støðu í býráðnum.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið frá TN og minnilutanum í FíN fekk 5 atkv. fyri (SOJ, KFO, ASJ, RN og JH) og 5 ímóti (KEZ, EyS, SJ, GvK og EA) og fall sostatt.

2.
2007-01-113 Standmynd – Mentanardeildin.

Í samband við 100 ára haldið hevur spurningurin verið frammi um at seta upp eina standmynd á økinum við Gamla Kirkjugarð. Málið hevur verið viðgjørt í samband við fíggjarætlanina 2008 og á øðrum fyrireikandi fundum.
Á fíggjarætlanini 2008 eru kr. 500.000,- settar av til endamálið, men seinastu tølini vísa ein væntaðan kostnað uppá áleið 1 mió. kr. Sí skriv frá Mentanardeildini 11.01.08, har lagt verður upp til at finna írestandi fíggingina frá møguligum øðrum íleggjarum.

Mentanarnevndin mælir til, at standmyndin verður reist sambært fyriliggjandi uppskoti og leisti. Umsitingin kannar hvar møgulig fígging kann útvegast aðrastaðni frá.

Fíggjarnevndin tekur undir við tilmæli frá MeN 16.01.08.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt

3.
2007-15-053 Umsókn um sundurbýti matr. nr. 317a.

Víst verður til umsókn frá eigaranum um sundurbýti av matr. nr. 317a.
Av tí at matr. nr. 317a heldur neyðugu víddina uppá (982 m2) sambært byggisamtyktini til at verða sundurbýtt, kann T.U. mæla til at umsóknin verður játtað. Tó við teirri treyt, at tinglisni gongurætturin gjøgnum matr. nr. 317a verður víðkaður til at umfata ferðslurætt/koyrirætt til tað frábýtta stykki.

Tekniska Nevnd tekur undir við tilmælinum frá T.U.11.01.2008.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt

4.
2007-15-052 Umsókn um sundurbýti av matr. nr. 23 Norðoyri.

Víst verður til umsókn frá eigarunum um sundurbýti av matr. nr. 23.

Umsóknin er í tráð við fyriliggjandi útstykkingarætlan og vegabreiðkan á Norðoyri, og mælir T.U. tí til at loyvi til sundurbýtið verður játtað.

Tekniska nevnd tekur undir við tilmælinum frá T.U. 11.01.08

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt

5. 2007-21-022 Nýggjan lim í ferðslunevndina.

Veljast skal ein limur/formaður í ferðslunevndina fyri Hans Arna Bertholdsen, ið hevur sagt sessin frá sær.

Býráðsins samtykt:
Samtykt at velja Kristian Fr. Olsen sum nýggjan formann í nevndini

Fundurin lokin